# Peppað polkaparty


Polkaholix fingu lív í fjöldina
Mynd: Oddur á Lakjuni

**Polkaholix spældu eina frálíka og lívliga konsert, sum fekk lív í fólkið á sandinum**

UMMÆLI
*Oddur á Lakjuni*
*oddur82@gmail.com*

Aftaná at Natasha Bedingfield hevði framført, sluppu tey flestu sær aðrastani at hugna sær; og táið týsku Polkaholix byrjaðu at spæla, var mest sum manntómt á sandinum. Men táið fólk uppdagaðu, hvat gekk fyri seg har niðri, kom alt rennandi. Og skjótt var ein stór, dansandi mannfjøld frammanfyri pallin.

Í 2001 funnu átta garvaðir polkatónleikarar úr Berlin saman og stovnaðu bólkin Polkaholix. Teir hava síðani spælt fleiri hundrað konsertir ymsastaðni í Evropa, og nú var túrurin komin til Gøtu.

Teir spældu polkatónleik við fullari ferð. Onkuntíð skiftu teir knappliga yvir í feitan rokktónleik, við síðani at hoppa avstað aftur í pumpandi polka. Miðaldrandi berlinarnir gjørdu hetta leikandi lætt; teir spældu púra tight allan vegin.

Upp í tónleikin blanda teir rokk, ska, jødiskt klezmer og fólkatónleik av Balkan, sum alt verður bundið at polkataktini.

Jákup Weihe, sum presenteraði Polkaholix, segði, at teir klára at framføra einhvønn sang í polkastíli. Tónleikurin er bygdur rundan um kendar og góðar gamlar sangir, sum verða, sum teir sjálvir siga, tvingsilsforpolkaðir.

Og tað var stuttligt at hoyra "Das Model" hjá Kraftwerk í superskjótari eitt-tvey takt.

Eisini vóru teir stuttligir í sanginum "Polka Kebab", sum knappliga skifti yvir í funkuta "Get Up" hjá James Brown, men við orðinum "kebab" ístaðin fyri "get up".

Útrykkið hekk væl saman. Ikki bara spældu teir polka, teir sóðu eisini út sum polka. Og teir lótu tað ongantíð vera dult, at meiningin var, at alt skuldi forpolkast. Setningar sum "We're on a mission of polka!" og "No polka, no fun!" vóru geylaðir út á hálvbrotnum enskum, sum um teir vildu sannføra áhoyrarnar um, at ikki bara einhvør sangur, men at eisini alt annað skuldi polkast til.

Og fólk tyktust at verða sannførd. Øgiliga orkan smittaði av yvir á áhoyrarnar, og allur sandurin dansaði til týsktmæltar sangir um blóðpylsu, øl og kebab. Tað, sum eingin kendi áðrenn, bleiv til eina dansiveitslu av tí aðru verð.

Í 70 minuttir hildu teir á við tí, sum nógv søgdu før at vera minniligasta konsertin á G! 2007.

# Børnini orkaðu...



**Foreldrini sóu nakað lin út eftir longu, rokkandi náttina. Men børnini á G! vóru púra klár til barnatiltakið á spæliplássinum leygardagin.**

FRÁSØGN
*Dánial Hoydal*
*dhoydal@hotmail.com*

Tiltakið var seinkað, men tey smáu høvdu tað fínt á spæliplássinum í strálandi sólskininum. Pylsur og Sisu hildu lív í teimum, meðan tey bíðaðu eftir Angelu og Hannibali.

Lagið í góðveðrinum var gott, og fólk høvdu hug at fáa sær slang í grasinum. Men tey vaksnu sluppu ikki at vera lin, tí hini á pallinum skumpaðu undir alla tíðina. Hannibal spulaði við vatni, og Jensina Olsen fekk rottað øll børnini saman móti foreldrunum, so tey vórðu togað upp úr grasinum, har tey høvdu sett seg væl til rættis við kaffimunnu og høvuðpínu.

Og so kókaði tað. Heldur enn at fjala seg fyri dropunum hjá Hannibali, runnu ung sum gomul eftir strálunum fyri at svala sær. Og provokasjónirnar hjá Jensinu riggaðu, so hon fekk gomlu gumparnar upp úr grasinum. So fóru teir at sveiggja, gumparnir, í takt við rútmurnar hjá børnunum. Sisu og høvuðpína hvurvu sum døgg fyri bakandi sól. G! hevur veruliga verið heppið við veðrinum. Og lagið á gestunum var hareftir. Eisini á børnunum, sum eiga ein fittan part av G!

Smílið á onkrum barni bliknaði tó, tá ótespiligir orkar knappliga komu tuskandi. Fjallatussarnir komu tysjandi og mundu koyrt manga pylsuna í rangastrúpan. Men so var bara at klemma mammu og babba eitt sindur fastari og annars ógvast og njóta.



Myndir: Sunva E. Lassen



Myndir: Sunva E. Lassen